# BILAR

SAMBAND
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Kykmyndir á portalinum**

**Myndir, sum sýna hvussu Park Assist virkar, eru at síggja á portal.fo sum kykmyndir**



VW Touran hýruvognurin hjá Eiriki Rasmussen parkerar uttan at førarin nertur við rattið




*Skíggin á instrumentborðinum sigur frá nær klart er at parkera*

# Bilurin parkerar sjálvur

**Tey flestu kenna til at skula parkera millum tveir bilar, men tora ikki og gevast, tí plássið er so lítið. Við Park Assist-skipanini hjá VW kann bilførarin róliga sita hendur í favn meðan bilurin parkerar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sit hendur í favn meðan bilurin parkerar. Tað ljóðar nokk so árbyrgdarleyst, at bilførarin situr hendur í favn, meðan bilurin sjálvur parkerar, men soleiðis er við nýggja VW Touran hýruvogninum hjá Eiriki Rasmussen, sum koyrir á bilstøðini Auto í Havn.

”Park Assist” er ein framkomin elektronisk skipan, sum hjálpir bilføraranum við at bakka bilin upp á pláss (millum tveir bilar) meðan bilførarin sjálvur situr hendur í favn og bíðar til bilurin stendur heilt stillur og rætt parkeraður millum tveir aðrar bilar og uttan at hjólini nerta við kantin á gongubreytini.

Útmátingin av økinum har bilurin skal parkera og stýringina av rattinum yvirtekur skipanin automatiskt, samstundis sum førarin hevur parkeringina av bilinum undir kontroll.

Um bilførarin kennirseg noyddan at taka í rattið og hjálpa til, verður parkeringshjálpin umgangandi avbrotin. Førarin skal einans hugsa um spitarin og bremsuna.

Tá bilførarin sær, at eitt pláss er til at parkera millum tveir bilar, blinkar hann inn til síðuna og trýstur á ein knøtt, so Park Assist skipanin skannar teir parkeraðu bilarnar og økið har bilurin skal parkera.

Park Assist skipanin aktiverast, tá bilurin verður settur í bakk-gir. Tá hevur førarin ikki meira at gera uttan at bíða til bilurin er komin upp á pláss og bremsa, tá bakkisensorarnir siga til. Av trygdaráðum hevur bilførarin fulla ábyrgd av bilinum undir parkeringini.

Tað eru sensorarnir, sum sita í kúfangarunum frammanog aftan, ið registrera alt rundan um bilin, og syrgja fyri at hann kemur heilskapaður upp á pláss. Um tað vísir seg, at tað ikki er pláss til bilin, so finnur skipanin út av tí og ger ikki klárt til at bakka.

Tá bilurin koyrir fram við teimum parkeraðu bilunum, og skipanin skannar økið, kann hann koyra við upp til 30 km/t og við eini frástøðu upp á hægst 1,5 m. Plássið, sum krevst fyri at bilurin skal kunna parkera, er longdin á bilinum pluss 1,4 metur.

Fyrimunurin við Park Assist skipanini er, at hon klárar at parkera bilin har sum lítið pláss er, og bilførarin helst ikki hevði hættað sær undir eina parkering.



*Mynd 1. Bilurin koyrir framvið og skannar báðar bilarnar, hann skal parkera ímillum. Mynd 2. Nú parkerar bilurin sjálvur. Mynd 3. Bilurin er komin upp á pláss*